# sum gjørdist eitt ævintýr






*Hendan stabbamyndin vísir, hvussu nógv Tróndur í Gøtu hevur selt fyri tey 20 árini (dimmu stabbarnir), og hvussu nógv skipið hevur rindað í hýru (ljósu stabbarnir).*



*Teir 11 partaeigararnir í Pf. Vinnuni. Frá vinstru: John Jarnskor, Bogi Jacobsen, Jaspur Hansen, Frits Thomsen, Arni Hansen, Jógvan Hentze, Dávid Jacobsen, Kári Hansen, Tummas Thomsen, Jákup Jacobsen og Pól Jacobsen.*

fer at fáa sær annað skip fyri Jupiter og Saksaberg. Umboð fyri reiðaríið hava verið í Noregi og kannað ymisk viðurskifti, men enn er eingin avgerð tikin í so máta.

Orsøkin, til at Tróndur í Gøtu ikki verður nevndur í sambandi við møguligt nýtt skip, er, at hann er sera væl egnaður til oljuvinnu. Eitt nú er hann nóg breiður til at virka sum seismikkskip. Jákup Jacobsen sigur, at teir hava eisini umhugsað tann møguleikan, men at eingin støða er tikin.

-Vit kanna allar møguleikar, men vit hava ongan skund, sigur hann.

## FAKTA

Navn: Tróndur í Gøtu
Skrás.nr: FD 175
Byggiár: 1986
Byggistað: Hellesøy Skipsbyggeri
Longd: 67,35 m
Breidd: 14,50 m
Dýpd: 8,35 m
BT: 2172,00



*Mynd: Skipalistin*